**Fra:** Torkil Vestergaard Rasmussen <torkilr@ummr.fo>
**Sendt:** 15. september 2022 11:37
**Til:** Jenis av Rana <JenisR@ummr.fo>; Poul Geert Hansen <PoulGeertH@ummr.fo>
**Cc:** Bergur Berg <BergurB@ummr.fo>; Katrin Jacobsen <KatrinJ@ummr.fo>; Hanna D. Andreassen <hanna@ummr.fo>
**Emne:** Upprit til landsstýrismannin um hvat er at gera viðv. navnalógini

Góðu tit

Sí viðhefta upprit og tilmæli viðvíkjandi navnalóggávuni.

Bh.
Torkil, Bergur og Katrin

**Fra:** Jenis av Rana <JenisR@ummr.fo>
**Sendt:** hósdagur, 15. september 2022 14:42
**Til:** Torkil Vestergaard Rasmussen <torkilr@ummr.fo>; Poul Geert Hansen <PoulGeertH@ummr.fo>
**Cc:** Bergur Berg <BergurB@ummr.fo>; Katrin Jacobsen <KatrinJ@ummr.fo>; Hanna D. Andreassen <hanna@ummr.fo>; Jenis av Rana <JenisR@ummr.fo>
**Emne:** SV: Upprit til landsstýrismannin um hvat er at gera viðv. navnalógini

Góðu tit trý!

Takk fyri frágreiðingina, bæði málsgongdarlýsingina og ikki minst metingina! Tó eri eg ikki samdur í tí tilmæli, sum tit gera útfrá teimum, haldi ikki at samanhangur er millum hesi, umframt at onnur atlit enn tey, tit nevna, áttu at verði tykin við í eina heildarlýsing.

Tessvegna takið eg ikki undir við tilmæli tykkara til mín.

atb.

Jenis

**Fra:** Poul Geert Hansen <PoulGeertH@ummr.fo>

**Sendt:** 15. september 2022 17:01

**Til:** Jenis av Rana <JenisR@ummr.fo>; Torkil Vestergaard Rasmussen <torkilr@ummr.fo>

**Cc:** Bergur Berg <BergurB@ummr.fo>; Katrin Jacobsen <KatrinJ@ummr.fo>; Hanna D. Andreassen <hanna@ummr.fo>

**Emne:** SV: Upprit til landsstýrismannin um hvat er at gera viðv. navnalógini

Góði Jenis,
Hvat merkir tað, at tú ikki tekur undir við tilmælinum?
Merkir tað, at tú vilt forða fyri, at kirkjan fylgir tulkingini hjá UVMR?
Uppritið staðfestir tulkingarrætting og skylduna at fylgja hesum.
Hvat vilt tú hava, at UMMR skal gera í hesum málinum?
PG

| | |
|---|---|
| **From:** | Jenis av Rana <JenisR@ummr.fo> |
| **Sent on:** | Thursday, September 15, 2022 7:25:23 PM |
| **To:** | Poul Geert Hansen <PoulGeertH@ummr.fo>; Torkil Vestergaard Rasmussen <torkilr@ummr.fo> |
| **CC:** | Bergur Berg <BergurB@ummr.fo>; Katrin Jacobsen <KatrinJ@ummr.fo>; Hanna D. Andreassen <hanna@ummr.fo>; Jenis av Rana <JenisR@ummr.fo> |
| **Subject:** | SV: Upprit til landsstýrismannin um hvat er at gera viðv. navnalógini |

Góði Poul Geert- her er ein roynd at svara spurningum tínum:

Hvat merkir tað, at tú ikki tekur undir við tilmælinum?

- Tað merkir, at landsstýrismðurin ikki: "tekur undir við, at fyrisitingin í Uttanríkis- og mentamálaráðnum vísir biskupi á fyrispurningssvar landsstýrismansins í umhvørvis- og vinnumálum, sum Umhvørvis- og vinnumálaráðið áður hevur víst biskupi á, og ikki heitir á biskup um at skipa soleiðis fyri, at kirkjubókaførandi sóknarprestarnir skráseta samsvarandi tulkingini hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum av navnalóggávuni, tvs. at sammøður kunnu javnsetast við møður og fedrar í mun til endamálið við § 7, stk. 1, nr. 1 í navnalógini, og at sammóður, sum fylgja av tulkingini hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til fyrispurning 2, kann verða skrásett í faðirs stað sambært lógini um fólkayvirlit".

Merkir tað, at tú vilt forða fyri, at kirkjan fylgir tulkingini hjá UVMR?

- Tað merkir, at eg, sum landsstýrismaður, ikki farið at brúka tað vald, sum eg møguliga havi, til at áleggja sóknarprestum og bispum at ganga ímóti tí, sum orð Guds lærir. Tvs. at tað merkir, at eg, sum landsstýrismaður stuðli bispum og prestum at lýða Gudi heldur enn monnum.

Hvat vilt tú hava, at UMMR skal gera í hesum málinum?

- Onki

atb.

Jenis